# Setrið – ein unikur

## Føroyamáls-deildin

Á Føroyamálsdeildini verður granskað og undirvíst í føroyskum máli og bókmentum. Eingin annar stovnur í heiminum hevur hetta starv um hendur. Tí miðar Føroyamálsdeildin eftir at fremja gransking á altjóða stigi og at bjóða fram dygdargóðar útbúgvingar á BA- og MA-stigi. Umfram føroyskt mál og føroyskar bókmentir veita námini innlit í bókmentir og mál í hinum Norðurlondunum.

### BA í føroyskum

Bachelorútbúgvingin í føroyskum máli og bókmentum tekur 3 ár. Byrjað verður við 2 ára støðisnámi. Staðið støðisnám er treyt fyri at fara undir triðja lestrarárið. Tá velja studentarnir millum lestrarevni, sum geva hinum einstaka møguleika at laga námið eftir áhugamálum og framtíðarætlanum sínum.

Studentur, ið hevur staðið BA-prógv í føroyskum, kann søkja um upptøku á MA-nám.

Útbúgvingin gevur starvsmøguleikar, har hollur kunnleiki til móðurmálið er neyðugur, t.d. innan fjølmiðlar, fyrisiting og granskingarstovnar

### MA í føroyskum

MA-nám á Føroyamálsdeildini eru tvinnanda: MA í føroyskum og samansett MA

MA útbúgvingin í føroyskum er samansett av lestrarevnum og MA-ritgerð. Lærarar á deildini og gestalærarar bjóða fram lestrarevni, sum studentarnir velja ímillum.

MA í føroyskum máli og bókmentum er útbúgving, sum gevur undirvísingarførleika í føroyskum á hægri skúlum, miðnámsskúlum og læraraskúla. Eisini gevur útbúgvingin góðan førleika at starvast í eitt nú í fjølmiðlunum.

MA-nám tekur 2 ár,.MA-prógv gevur rætt til heitið magister artium, stytt MA Lokið MA-prógv við góðum úrsliti gevur møguleika fyri at fara undir Ph.D.-nám.

Samansett MA tekur 5 ½ ár. Hetta er miðnámslæraraútbúgving, samansett av høvuðsgrein og hjánámi umframt námsfrøði.

Samband: tlf. 352520



- Tað ber ikki til at ganga og krógva seg í einum so lítlum lestrarumhvørvi, og tað haldi eg vera fínt, sigur Henrietta Hammer, sum lesur føroyskt á Føroyamálsdeildini

## Sum ein hugnalig familja

### Henrietta Hammer, 24 ár, úr Kollafirði

24 ára gamla Henrietta Hammer úr Kollafirði lesur føroyskt á fyrsta ári. Fyri hana var tað ongantíð tað stóra ivamáli, hvat og hvar hon skuldi byrja at lesa

– Eg vil gjarna sleppa at vera í Føroyum og havi leingi havt ein dreym um at lesa føroyskt, so tað gav seg mest sum sjálvt. Eg hevði nokk ikki setst aftur, um eg varð noydd at flyta av landinum, men tað ger alt øgiliga nógv lættari at sleppa undan at finna kollegieíbúð og koma inn í fremmandar skipanir av ymsum slag, sigur Henrietta Hammer.

Hon leggur afturat, at tað eisini taldi nógv, at hon hevði hoyrt so nógv positivt um Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum. Í so máta gjørdist hon ikki vónbrotin, men hon hevði ikki ímyndað, at hennara nýggja lestrarumhvørvið fór at vera so lítið.

– Tað er eitt sindur keðiligt, at man ikki hevur meir samband við tey lesandi á hinum deildunum, tí vit eru so spjadd í ymsum bygningum. Men vit kunnu jú eisini bara sjálvi syrgja fyri at skipa fyri onkrum ordiligum veitslum, har øll eru við, sigur Henrietta.

Fyri tað mesta heldur Henrietta kortini, at lítla umhvørvið er ein fyrimunur.

– Vit eru 12 í flokkinum, so vit eru sum ein lítil, hugnalig familja, har tað ikki ber til at sita og krógva seg aftanfyri onkran. Tað dámar mær væl, tí tað ger tað lættari at fáa øll í flokkinum við í kjakið í tímunum, sigur Henrietta.

Lítla umhvørvið ger eisini, at tú altíð skjótt og lætt kanst fáa orðið á ein lærara, um tú hevur brúk fyri hjálp og vegleiðing, og tað setur Henrietta stóran prís uppá.

– Í so máta kann eg ímynda mær, at tað kann blíva eitt sjokk at koma á eitt av stóru universitetunum uttanlands. Fakliga verður tað tó neyvan nakar trupulleiki, tí støðið í frálæruni her feilar avgjørt onki, sigur Henrietta Hammer.

## Náttúruvísundadeildin • Náttúruvísu

Allar útbúgvingarnar á Náttúru- og vísundadeildini eru skipaðar eftir **altjóða** leisti, sum ger tað lætt at lesa víðari á øðrum universitetum kring heimin.

### Lívfrøði

Bachelor útbúgvingin í lívfrøði tekur trý ár og gevur tær eina breiða vitan um lívfrøði. Útbúgvingin er skipað eftir altjóða leisti, men sum nakað serstakt verður føroyska náttúran ein náttúrligur partur í undirvísingini.

Í útbúgvingini lærir tú um, hvussu livandi verur eru uppbygdar og hvussu tær fungera. Í útbúgvingini verður eisini lært um evna- og lívevnafrøði, sum stuðla undir fatanina av lívfrøðiligum fyribrigdum.

At vera lívfrøðingur í Føroyum er nakað heilt serligt. Náttúra okkara liggur so mikið fjarskotin og burtur frá øðrum, at hetta á mangan hátt setir sín sermerkta dám á djóralív og plantulív okkara. Av somu orsøkum er altjóða áhugi fyri at gera genetiskar kanningar av føroyska fólkinum.

Útbúgvingin gevur tær grundarlag fyri fjøltáttaðum og spennandi arbeiðsøkjum. Nøkur dømi eru:

Fiskirannsóknir, m.a. gera kanningar av føði, fóður-søltum, plantu- og djóraplankton, vøkstri og vakstrarbroytingum hjá fiski og at gera stovnsmetingar.

### Bachelor í Jarð- og havfrøði

Bachelor útbúgvingin í Jarð- og havfrøði tekur trý ár og gevur tær eina breiða vitan um jarð- og havvísindi. Útbúgvingin er skipað eftir altjóða leisti, men sum nakað serstakt fært tú her eisini vitan um føroysku undirgrundina og um sambandið millum havstreymar kring Føroyar, veðurlag og fiskastovnar.

Stórur áhugi er fyri føroysku undirgrundini og mong altjóða oljufeløg hava seinnu árini verið virkin í leiting eftir olju og gassi í føroyska økinum. Somuleiðis er stórur áhugi fyri havinum kring Føroyar, tí her reka stórir streymar, ið ávirka veðurlagið kring allan heim.

Útbúgvingin gevur tær vitan og førleika til at luttaka í rannsóknum eftir olju og gassi í undirgrundini og í havfrøðiligum rannsóknum. Útbúgvingin gevur eisini grundarlag fyri fyrisitingarligum arbeiði, t. d. í oljufyrisiting ella umsiting av havumhvørvinum.

### Bachelor í KT-verkfrøði

Bachelor útbúgvingin í KT- verkfrøði tekur trý ár og er skipað eftir altjóða leisti við denti á føroysk evni og nýtslumøguleikar. Útbúgvingin sameinir tær teknisku og skapandi loysnirnar, alt frá grundleggjandi elektronikki til víðfevnda forritan, á ein hátt, sum gevur tær eina breiða vitan um kunningar og samskiftistøkni (KST).